# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Nøkur minningarorð um
# Turid Abrahamsen í Fuglafirði

Turid varð fødd tann 23.8.1912 og andaðist tann 20. august 2008.

Tað kundi verið nógv at skriva um hesa megnar og røsku kvinnu.

Tað eru nú mong ár síðan eg persónliga kom at kenna Turid. Tað var tá ið Alaksandur (maður hennara) gjørdist formaður fyri Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag, og eg bleiv nevndarlimur. Tá vóru nevndarfundirnir hildnir í heiminum hjá teimum, tí felagið átti eingi hús tá at fundast í.

Ein legði alt fyri eitt til merkis hennara stilla talumáta hon nýtti, tá ið hon kom innar við einum kaffimunni.

Seinni, tá eg var í eini kirkju í Danmark, bleiv ein einasti konfirmantur konfirmeraður. Hann varð føddur og uppvaksin eini 6 ár í Frankaríki. Foreldrini og hann fluttu síðan til Danmarkar og búsettust har.

Presturin segði millum annað við hann: Eg veit, at tú tosar tað danska málið og tað er gott at duga, nú tú býrt í Danmark. Og tú dugur eisini at tosa tað franska málið. Og tað er gott at duga tað, tá ið tú ferðast í Frankaríki.

Men eg vil siga tær og okkum øllum í kirkjuni um eitt annað mál, og tað er kærleikans mál. Og tað var



nevnliga hetta mál, ið Turid nýtti í móti sínum medmenniskjum.

Í 1985 kom eg at kenna Turid enn betur. Tað var táið Fuglafjarðar Pensjónistafelag bleiv stovnað, hon var ein, ið var við at stovna felagið. Hon var eisini við á hvørjum fundi og útferðum, so leingi hon orkaði tað.

Turid var kirkjufólk og møtisfólk burtur av. Og eg ivist onga løtu í, uttan hon mangan hevur hugsað um sangin:

*Søguna sig mær um Jesus,*
*orðið at hjarta mær før,*
*sig mær ta søgu so dýra,*
*boðskapin besta á jørð!*
*Songin, sum hirðarnir hoyrdu*
*songin um frøi og frið,*
*sangin til heiður til Harran,*
*lat okkum syngja hann við!*

Turid hevur ikki liva væl tey seinastu árini. Men nú er hon sloppin heim, og kann eins og sangarin syngja:

*Mær leingist til tey kæru*
*sum bíða uppi har,*
*vit minnast ei ta tíð á foldum var.*
*Mær leingist heim til teirra,*
*sum fóru undan mær,*
*men Frelsran eg ynski síggja fyrst.*

Æra verður minnið um Turid.

**Símun P. Poulsen**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæra systir

**Marjun Heimá**

andaðist og varð borin til hvíldar.
Tøkk til Jógvan Christiansen fyri orðini á Lágargarði, og hjálpina við jarðarferðina.
Tøkk til Eivind av Reyni og Jórun Sumberg-Olsen fyri orðini í kapellinum. Tøkk til Mariu í Ullvøruhúsinum fyri sangin í kapellinum.
Tøkk til Árna av Reyni og sangararnar við undirspæli og sangi.
Eisini ein tøkk til Svenning av Lofti fyri orðini á grøvini.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Zarepta, og tøkk til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Eina stóra tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk tøkk til tykkum á Lágargarði, ið vóru so góð við hana, meðan hon var hjá tykkum.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**

# Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Jóanis Poulsen**

andaðist og varð jarðaður.
Serstøk tøkk til starvsfólkini á B6 á Landssjúkrahúsinum, Hera Joensen, prest, og øll tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur og kransar og gávur til Krabbameinsfelagið.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Elinborg, Jóhan og Christian Eli**



*Myndaeigari: Marita Guttesen*

# Realskúlaflokkur í 1953

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av gentum í Realskúlanum í 1953.

Aftara rað f.v.: Elsebeth Sørensen, Nanly Juul, Gunnvør Christiansen, Kamma Joensen (Ellefsen), Ata Vibeke Hansen, Jutta Joensen (Midjord) og Agnas Sundstein (Jacobsen).

Fremra rað f.v.: Elsba Súsanna Joensen (Hansen), Elsba Jacobsen (Hardlei), Ingrid Jacobsen, Anna Egholm (á Steig), Elisabeth Sundstein (Jóannesarson) og Martin Holm, lærari

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 351)

**Dagurin**
**10. juni. Onuphrius**, deyður umleið ár 400. Eftir halgisøguni var hann kongssonur av Blálondum, sum gjørdist kristin, segði alt frá sær og livdi til sín doyggjandi dag sum einbúgvi í egyptisku oyðimørkini.